# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bretsk sendiharravitjan

Nú í vikuskiftinum kemur bretski sendiharrin í Danmark á vitjan í Føroyum. Tað er rættiliga náttúrligt, at bretskir sendiharrar vitja viðhvørt, tí talan er hóast alt um okkara næsta granna, ið liggur nærri at Føroyum enn nakað annað land. Hetta gloyma føroyingar mangan – serstakliga okkara lógarsmiðir. Hvat kunnu vit so brúka eina slíka sendiharravitjan til? Sjálvandi skulu vit taka væl ímóti teimum gestum, sum hava hug at vitja, men vit mugu eisini gera sum mest brúk av slíkum vitjanum.

Alt gott um at vísa Kirkjubømúrin og flagtekjur fram, men vit mugu seta okkum eitt sindur hægri mál enn tað við einari slíkari vitjan eins og øðrum almennum ella hálvalmennum vitjanum. Fyri bretska sendiharran, so er tað relevant hjá teimum í Tinganesi, ið skipa fyri skrá hansara, at spyrja tveir spurningar. Hesir spurningar eru: hvør handlar og samskiftir við Bretland í dag, og hvør ætlar sær at handla og samskifta við Bretland framyvir.

Í fyrra bólkinum eru fiskaseljarar, Atlantsflog, Smyril Line, heilsølur o.s.fr. Viðvíkjandi seinna bólkin eigur heilt avgjørt SamVit at vera inndrigið við teimum hugskotum, sum har koma fyri dagin. Harafturat er Vinnuhúsið sjálvskrivað at hitta sendiharran og aðrar sendiharrar, sum koma henda vegin.

Sjálvandi eiga stýrini eisini at hitta sendiharran í tann mun, samstarv er í umbúnað ella ynskist. Mentamálaráðið er ein upplagdur partur at hitta bretska sendiharran viðvíkjandi útbúgvingarsamstarv við Bretland. Tó eigur man í so stóran mun sum gjørligt at fáa sendiharran út at vitja virkir og fólk, sum hava ein áhuga at stimbra samstarv við Bretland. Tað ber ikki til, um sendiharrin gongur og brúkar ov nógva tíð at taka í hondina á bureukratum av ymsum slag uttan endamál. Hetta er eisini galdandi fyri døgurðar og annað, sum eiga at hava eitt bevíst vinnupolitiskt mál og eina samanseting av gestum, sum hava tørv á kontakt við Bretland, heldur enn at fáa váttað sína "tign".

At lata hurðar upp fyri vinnuni, er tað, sum ein sendiharravitjan eisini skal brúkast til. Tað burdi eisini verið endamálið við okkara sendiumboðan uttanlands, hóast hetta kanska ikki er so sjónligt, sum tað burdi verið. Ein bretskur sendiharri kann vera týðandi liður í at fáa sambond, ið geva atgongd til bretska marknaðin. Vónandi hevur Løgmansskrivstovan hetta í huga. Aftrat hesum hevur mentanarliga samstarvið eisini alstóran týdning.

Sosialurin

Sosialurin

## Vit eru við har tað er stuttligt at vera

**KÁRI P. HØJGAARD**
Varaborgarstjóri



Hóast bert 12 umfør eru leikt og 45 stig eru eftir at kappast um, kunnu vit ásanna, at NSÍ liggur á einum trý-deildum fyrstaplássi saman við B 36 og EB/Streymi. Vit eru í oddinum, har tað er stuttligt at vera. Tíðin fer at vísa, um vit klára at halda út til endan og náa málinum, vit hava droymt um og kempa fyri, fyrstaplássinum, meistaraskapinum. Ofta hava vit við kappingarbyrjan sett nøsina høgt og sagt, at í ár skal tað verða, men besta úrslitið vit hava nátt higartil, er silvur.

Hvussu eru so møguleikarnir í ár at vinna gull ?

NSÍ hevur eitt gott lið í ár. Tíverri má ásannast, at mangan spælir liðið ikki báðar hálvleikirnar við fullari megi, men tað kemur. Vit hava royndasta venjaran í landinum, og er tað nakar sum kann leiða NSÍ á sigurskós, so er tað Jóhan Nielsen. Vit hava fleiri góðar ungar spælarar, ið fáa altsamt meiri spælitíð á liðinum, so eisini framtíðin tykist bjørt hjá felagnum. Aftasti skansin Jens Martin hevur júst runda tey 40 og er "still going strong", samanumtikið ein góð blanding av royndum spælarum og ungum kreftum.

Alt her á fold hevur sína tíð. Hálva øld hevur NSÍ virka og tá ein lítur aftureftir, er nógv broytt hetta tíðarskeiðið. Serliga minnist eg ein hendingaríkan dyst, tá NSI spældi móti KÍ. Beinanvegin í dystinum, tók Ingolf hjá Bankmanninum fer á, rak allan vegin fram móti málinum hjá KÍ, har hann hegnisliga setti bóltin í neti til eitt null. Spenningurin millum heimaáskoðararnar var øgiligur, endiliga skuldu klaksvíkingar basast, men gakk, hetta skuldi vísa seg at blíva einasta máli ið hesum dysti sum NSÍ fekk, harafturímóti fekk KÍ so vítt eg minnist heili tíggju mál, so hetta man vera eitt tað vánaligasta úrslitið hjá NSÍ nakrantíð.

Eisini uttanfyri vøllin eru onnur andlit at síggja. Eg haldi at teir eldru livdu meira við í dystinum, enn vit mangan síggja í dag. Var vátt í veðrinum og Niclas skyldmaðurin hevði hugt eftir tveimum fylgjandi dystum, var bøurin sortnaður, har hann hevði staðið og sparka í vøllin, so nógv livdi hann við í spælinum. Henning, Dia Gaardbo, Meinhardt hjá Palla, Yddi, Oluf Weihe, Kjartan hjá Jústinesi, fyri at nevna nakrar av teimum gomlu, ein serliga minnist.

Serliga tær yngru deildirnar hjá NSÍ hava megnað at fingið góð útslit. Eitt miðvíst ungdómsarbeiði í hesum felag, ið er eitt av teimum størstu feløgunum í landinum, hevur borið úrslit. Formulaliðið er í toppinum, 1. deild í miðjuni, men eitt hjartasuff havi eg til leiðsluna. "Geri eitt miðvíst arbeiði fyri at menna 1 deild kvinnur, áðrenn tær missa hugin og gevast". Vit hava góðar leikarar, men hópurin er alt ov tunnur og tveir dystir eru taptir, tí tær ikki fáa manna lið. Gott í tykkum, lati ikki kvinnufótbóltin detta niður fyri, tað kann verða seinur dagur, áðrenn hann kemur fyri seg aftur.

Sigursvanda útiliðið HB, vitjar við Løkin í Runavík í dag. Teir hava eitt gott lið og teir eru svangir eftir at fáa stig, nú tað í landskappingini ikki hevur gingið sum væntað, og seinasta sunnudag taptu teir landskappingardystin móti B 71. Eitt av bløðunum skrivaði, at HB hevði ein veikleika fyri gulum, tí serliga GÍ og B71 høvdu givið teimum trupulleikar. Nakað av gulum er í NSÍ-búnanum og spælir heimaliðið upp til sítt besta í dag, so skuldi ein møguleiki verði fyri, at enn ein heimasigur fekst til høldar.

Góðan dyst.

## Føroyar eitt valdømi

**ZAKARIAS WANG**



Nú bendir alt á, at uppskotið um at niðurleggja okkara sjey uppstillingardømi verður samtykt.

Tað er nevnliga meiriluti í tinginum fyri hesum uppskoti. Teir, sum eru ímóti, fara eftir øllum at døma ikki at gera tað einasta, sum kundi støðgað tí. Tað hevði verið, at seks samgongulimir skriva eitt bræv til løgmann og siga honum frá, at sær hann ikki til, at vallógaruppskotið verður tikið av borðinum, so fara teir beinanvegin í tingið við uppskoti um misálit á hann. Eitt slíkt uppskot hevði andstøðan verið noydd til at greitt atkvøðu fyri, og so hevði løgtingsval verið til vanliga tíð í fyrru helvt av november.

Lítið trúligt er, at teir tingmenn í samgonguni, sum siga seg vera ímóti at leggja niður uppstillingardømini, fara at seta trumf á, og tí mugu vit rokna við, at til komandi løgtingsval fara vit at hava landsumfatandi listar.

Hetta kemur at geva nógv nýggj ivamál. Tvey kunnu nevnast her.

**Hvør skal koma upp á listarnar?**

Ein møguleiki hevði verið, at vit eins og í USA hava eitt undanval, har veljararnir hjá teimum politisku flokkunum sleppa at atkvøða um, hvør ið skal stillast upp fyri flokkin.

**Skulu vit hava loyniligt val?**

Í næsta grannalandi okkara, Stórabretlandi, verða allar atkvøðurnar í valdøminum savnaðar saman í einum stað, og verða har taldar upp. Teir siga, at verða atkvøðurnar taldar upp í hvørjari bygd sær, ber alt ov væl til at eygleiða hvør ið atkvøður fyri hvørjum, og harvið kunnu veljararnir verða kroystir til at atkvøða øðrvísi teir innast inni vilja.

Við teimum samferðslumøguleikum, vit hava í dag, er tað einki problem at savna allar atkvøður í øllum Føroyum saman í einum stað og telja tær upp á ein slíkan hátt, at tað ikki ber til hjá nøkrum at siga, á hvønn ein ávísur veljari hevur atkvøtt.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.